MENTAMÁLARÁÐIÐ
INNANHÝSIS

Dagfesting: 17. september 2018
Tygara ref.: JN/EJ
Máltal: 18/00156-26

**Løgtingsmál nr. xx/2018: Uppskot til løgtingslóg um heilsuhjálparaútbúgving, heilsurøktaraútbúgving og pedagoghjálparaútbúgving (Heilsuhjálparaútbúgving, heilsurøktaraútbúgving og pedagoghjálparaútbúgving)**

## Uppskot til

## Løgtingslóg um heilsuhjálparaútbúgving, heilsurøktaraútbúgving og pedagoghjálparaútbúgving.

### Kapittul 1
### Endamál

**§ 1.** Landsstýrismanninum verður heimilað at skipa fyri útbúgvingum til heilsuhjálpara, heilsurøktara og pedagoghjálpara.

*Stk. 2.* Útbúgvingarnar til heilsuhjálpara og heilsurøktara hava til endamáls at:

1) Geva næminginum yrkisfakligan førleika at røkja stuðuls-, røktar- og umsorganaruppgávur í kommunala økinum og á almanna- og heilsuøkinum,
2) Geva næminginum almennan lestrarførleika, ið er grundarlag undir víðari útbúgving,
3) Menna innlit næmingsins um samfelagsviðurskifti, eisini í yrkisligum høpi og
4) At næmingurin kann menna sínar persónligu-, samstarvs-, og læringarførleikar.

*Stk. 3.* Útbúgvingin til pedagoghjálpara hevur til endamáls at:

1) Geva næminginum yrkisførleika at røkja námsfrøðiligar og umsorganaruppgávur á dagstovna-, skúla- og almannaøkinum.
2) Geva næminginum almennan lestrarførleika, ið er grundarlag undir víðari útbúgving,
3) Menna innlit næmingsins um samfelagsviðurskifti, eisini í yrkisligum høpi og
4) At næmingurin kann menna sínar persónligu-, samstarvs-, og læringarførleikar.

**§ 2.** Útbúgvingarnar fara fram í Heilsuskúla Føroya.

### Kapittul 2
### Upptøka

**§ 3.** Upptøka til heilsuhjálparaútbúgvingina er treytað av, at umsøkjari hevur:

1) Í minsta lagi 1 ára útbúgving ella 1 ára arbeiðsroyndir eftir 9. floks próvtøkur fólkaskúlans ella
2) Samsvarandi royndir.

*Stk. 2.* Heilsuskúli Føroya tekur upp umsøkjara við støði í heildarmeting av, um umsøkjarin, eftir meting skúlans, er førur fyri á nøktandi hátt at lúka krøvini í útbúgvingini.

**§ 4.** Upptøka til heilsurøktaraútbúgvingina er treytað av, at umsøkjari hevur:

1) Lokið heilsuhjálparaútbúgving ella
2) Viðkomandi útbúgvingar- og arbeiðsroyndir, sum hava vart í minsta lagi 15 mánaðir.

*Stk. 2.* Heilsuskúli Føroya tekur upp umsøkjara við støði í heildarmeting av, um umsøkjarin er førur fyri, á nøktandi hátt, at lúka krøvini í útbúgvingini.

**§ 5.** Upptøka til útbúgvingina til pedagoghjálpara er treytað av, at umsøkjari:

1) Hevur lokið 9. floks próvtøku fólkaskúlans og
2) Hevur minst 2 ára útbúgving ella 2 ára arbeiðsroyndir.

*Stk. 2.* Heilsuskúli Føroya tekur upp umsøkjara við støði í heildarmeting av, um umsøkjarin er førur fyri, á nøktandi hátt, at lúka krøvini í útbúgvingini.

**§ 6.** Leiðarin í Heilsuskúla Føroya kann geva næmingi avriksflutning fyri partar av útbúgvingini við støði í viðkomandi útbúgving ella starvsligum royndum, um stig og ella innihald frá aðrari lærugrein kann javnsetast. Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglum um avriksfluting.

## Kapittul 3
## Útbúgvingarnar

**§ 7**. Útbúgvingarnar fevna um ein ástøðiligan og ein starvsligan part.
*Stk. 2.* Útbúgvingarnar verða skipaðar, so ástøðiligu og starvsligu partarnir stuðla upp undir hvønn annan.

**§ 8.** Útbúgvingin til heilsuhjálpara tekur 15 mánaðir, íroknað frítíð. Í minsta lagi 28 vikur av útbúgvingartíðini fevna um undirvísing í skúla.
*Stk. 2.* Útbúgvingin skal geva førleika til sjálvstøðugt at røkja grundleggjandi stuðuls-, røktar- og umsorganaruppgávur.

**§ 9.** Útbúgvingin til heilsurøktara tekur 22 mánaðir, íroknað frítið. Í minsta lagi 40 vikur av útbúgvingartíðini fevna um undirvísing í skúla.
*Stk. 2.* Útbúgvingin skal geva førleika til sjálvstøðugt at røkja og leggja til rættis samansettar ítrivs- og umsorganaruppgávur, ið fevna um m.a. at samskipa og undirvísa, og sjálvstøðugt at røkja og leggja til rættis grundleggjandi heilsu- og sjúkrarøktaruppgávur.

**§ 10.** Útbúgvingin til pedagoghjálpara tekur 24 mánaðir, íroknað frítíð. Ástøðiligi parturin íroknað próvtøku, skal í minsta lagi fevna um 44 vikur, sum er undirvísing í skúla.
*Stk 2.* Útbúgvingin skal geva næminginum grundleggjandi námsfrøðiligar førleikar til sjálvstøðugt og umsorganarfult at røkja og leggja tilrættis mennandi og stimbrandi námsfrøðiligt virksemi, sum styðjar uppundir menningina, trivnaðin og læringina hjá børnum, ungum og vaksnum.

**§ 11.** Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um útbúgvingarnar, herímillum um innihald, vav, próvtøkur, próvtøl, prógv og kæru um próvtøku.
*Stk. 2.* Uppskot til reglur sbrt. stk. 1 verða sendar landsstýrismanninum í almannamálum, landsstýrismanninum í heilsumálum, landsstýrismanninum í kommunumálum og Kommunufelagnum til ummælis, áðrenn tær verða settar í gildi.

**§ 12.** Heilsuskúli Føroya ger námsskipanir, sum áseta, hvussu útbúgvingarnar verða lagdar til rættis.
*Stk. 2.* Heilsuskúli Føroya og starvsvenjingarstøðini samstarva um at røkka teimum málum, sum eru ásett í námsskipanunum.
*Stk. 3.* Mentamálaráðið góðkennir námsskipanirnar.

**§ 13.** Starvsvenjingin fer fram á útbúgvingarstøðum, ið Heilsuskúli Føroya hevur góðkent.

**§ 14.** Heilsuskúli Føroya tryggjar næmingar bæði í skúla- og starvsvenjingarpørtunum.

**Kapittul 4**
**Leiðsla**

**§ 15.** Landsstýrismaðurin setir í starv og loysir úr starvi leiðara fyri Heilsuskúla Føroya.
*Stk.2.* Landsstýrismaðurin ásetir reglur um faklig og námsfrøðilig førleikakrøv til leiðara og lærarar í Heilsuskúla Føroya.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann gera av, at Heilsuskúli Føroya verður partur av einari umsitingarligari eind.

**§ 16.** Leiðarin fyri Heilsuskúla Føroya hevur ábyrgd av virksemi skúlans mótvegis landsstýrismanninum.
*Stk 2.* Leiðarin fyri Heilsuskúla Føroya tekur allar ítøkiligar avgerðir viðvíkjandi næmingunum, til dømis avtalur um upptøku, ávaringar, burturvísing og onnur agatiltøk.
*Stk. 3.* Leiðarin fyri Heilsuskúla Føroya heldur próvtøku og skrivar út prógv.
*Stk. 4.* Leiðarin fyri Heilsuskúla Føroya setir í starv og loysir úr starvi lærarar og onnur starvsfólk.

**§ 17.** Heilsuskúli Føroya hevur skyldu at lata Mentamálaráðnum allar kravdar upplýsingar í talgildum formi sambært áseting Mentamálaráðsins.

**Kapittul 5**
**Næmingaviðurskifti**

**§ 18.** Heilsuskúli Føroya ger saman við einstaka næminginum eina persónliga útbúgvingarætlan, har mál verða sett fyri hvønn útbúgvingarpart sær og fyri útbúgvingina í síni heild.

**§ 19.** Næmingur, við avmarkaðum fakligum førleika, kann fáa eyka undirvísing sambært reglum, sum landsstýrismaðurin ásetur**.**

**§ 20.** Næmingur kann fáa sernámsfrøðiligan stuðul sambært reglum, sum landsstýrismaðurin ásetir.

**§ 21.** Heilsuskúli Føroya veitir næmingum yrkis- og lestrarvegleiðing sambært reglum, ið landsstýrismaðurin ásetir.

**§ 22.** Næmingur skal vera til staðar og vera virkin í undirvísingini.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ger reglur um at vera til staðar og at vera virkin í undirvísingini.
*Stk. 3* Landsstýrismaðurin ger nærri reglur um agatiltøk fyri brot á reglurnar, sum givnar eru sbrt. stk. 2.
*Stk. 4.* Leiðarin í Heilsuskúla Føroya hevur skyldu at kunna næmingin um reglurnar í stk. 2 og 3.

**§ 23.** Leiðarin á Heilsuskúla Føroya ger reglur fyri skilhald.
*Stk. 2.* Næmingur hevur skyldu at halda skilhaldsreglur skúlans.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin góðkennir skilhaldsreglurnar og ger nærri reglur um agatiltøk fyri brot á reglurnar, sum givnar eru sbrt. stk.2.
*Stk. 4.* Leiðarin á Heilsuskúla Føroya hevur skyldu at kunna næmingin um reglurnar sbrt. stk. 2 og um avleiðingarnar, um reglurnar ikki verða fylgdar.

**§ 24.** Leiðarin í Heilsuskúla Føroya hevur ábyrgd av, at framdar verða regluligar og ítøkiligar innanhýsis eftirmetingar av lestrarstøðu næmingsins.
*Stk. 2.* Leiðarin í Heilsuskúla Føroya skal, saman við viðkomandi lærarum í minsta

lagi eina ferð í hvørjari skúlahálvu, eftirmeta úrslit í einstøku flokkunum og ella bólkunum og hjá einstaka næminginum.
*Stk. 3.* Leiðarin ger reglur um eftirmetingar sbrt. stk. 1 og 2, og hevur skyldu at kunna nKemingin um hesar.

**§ 25.** Næmingurin skal sjálvur útvega sær bøkur og annað undirvísingartilfar.
*Stk. 2.* Heilsuskúla Føroya verður heimilað at krevja gjald í sambandi við ljósritan og útprenting.

## Kapittul 6
## Útbúgvingarráð

**§ 26.** Landsstýrismaðurin tilnevnir eftir tilmæli útbúgvingarráð til heilsuútbúgvingarnar, sum skal ráðgeva landsstýrismanninum í málum viðvíkjandi heilsuútbúgvingunum. Útbúgvingarráðið hevur 7 limir umboðandi Heilsurøktarafelagið, Heilsuhjálparafelag Føroya, Kommunufelagið, Sjúkrahúsverk Føroya, Almannaverkið, Heilsumálaráðið og eitt umboð fyri lærararnar, sum undirvísa á heilsuútbúgvingunum í Heilsuskúla Føroya.
*Stk. 2.* Fyri hvønn ráðslim verður ein varalimur tilnevndur.
*Stk. 3.* Ráðslimirnir skulu hava fakligt innlit í tey arbeiðsøki, sum lógin um heilsuútbúgvingarnar fevnir um.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin tilnevnir formannin.
*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um Útbúgvingarráðið fyri heilsuútbúgvingarnar, herímillum um tilnevningarskeið, mannagongdir fyri ráðsarbeiðnum, hvørji mál ráðið skal ummæla, útreiðsluheimild og skipan av skrivstovuhjálp.

**§ 27.** Landsstýrismaðurin tilnevnir eftir tilmæli Útbúgvingarráð til pedagoghjálparaútbúgvingina, sum skal ráðgeva landsstýrismanninum í málum viðvíkjandi pedagoghjálparaútbúgvingini. Útbúgvingarráðið hevur 6 limir umboðandi Føroya Pedagogfelag, Felagið fyri hjálparfólk, Kommunufelagið, Almannaverkið, Námsvísindadeildina á Fróðskaparsetri Føroya og eitt umboð fyri lærararnar, sum undirvísa á pedagoghjálparaútbúgvingini.
*Stk. 2.* Fyri hvønn ráðslim verður ein varalimur tilnevndur.
*Stk. 3.* Ráðslimirnir skulu hava fakligt innlit í tey arbeiðsøki, sum lógin um námsatstøðinginaútbúgving fevnir um.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin tilnevnir formannin.
*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um Útbúgvingarráðið til pedagoghjálparaúbúgvingina, herímillum um tilnevningarskeið, mannagongdir fyri ráðsarbeiðnum, hvørji mál ráðið skal ummæla, útreiðsluheimild og skipan av skrivstovuhjálp.

**§ 28**. Heilsuskúli Føroya og Útbúgvingarráðini sbrt. §§ 26 og 27 eftirmeta javnan tørvin á dagføringum og broytingum innan heilsuútbúgvingarnar og pedagoghjálparaútbúgvingina og gera, hvør sær uppskot til landsstýrismannin hesum viðvíkjandi.
*Stk.2.* Útbúgvingarráðini skulu hava námsskipanirnar til ummælis, áðrenn tær verða sendar Mentamálaráðnum til góðkenningar, sbr. § 12, stk. 3.
*Stk. 3.* Útbúgvingarráðini kunnu av sínum eintingum viðgera øll viðurskifti, ið hava týdning fyri útbúgvingarnar, og gera tilmæli.
*Stk. 4.* Útbúgvingarráðini kunnu eftir tørvi innkalla serkøn at møta á ráðsfundi.

## Kapittul 7
## Kæra

**§ 29.** Avgerð leiðarans í námsfrøðiligum málum, millum annað í próvtøkumálum,

kann innan 7 dagar eftir, at avgerðin er kunngjørd næminginum, kærast til landsstýrismannin. Kæran skal vera skrivlig, ítøkilig og grundgivin.
*Stk. 2*. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um kærur sbrt. stk. 1.
*Stk. 3*. Fyrisitingarlig avgerð, ið er tikin av leiðaranum, sum ikki er fevnd av stk. 1, kann kærast til landsstýrismannin. Kærufreistin er 4 vikur eftir, at kærarin hevur móttikið avgerðina.

## Kapittul 8
## Gildiskoma og skiftisreglur

**§ 30.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og er galdandi fyri næmingar, sum byrjaðu undirvísingina aftaná 1. januar 2019. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 57 frá 26. mai 2010 um heilsuhjálpara- og heilsurøktaraútbúgvingar, tó soleiðis, at reglurnar í framanfyri nevndu lóg, framvegis eru galdandi fyri næmingar, sum hava byrjað útbúgvingina til heilsuhjálpara ella heilsurøktara fyri 1. januar 2019.
*Stk. 2*. Kunngerðin um námsfrøðiliga útbúgving av lærarum á vinnu- og miðnámsskúlunum er eisini galdandi fyri leiðara og lærarar í Heilsuskúla Føroya sambært hesi lóg.

## 1.2.1 Kap 1. Almennar viðmerkingar

### 1.2.1.1Orsøkir til uppskotið
Orsøkin til lógaruppskotið er, at samgongan hevur sett sær fyri at menna námsfrøðiliga virksemi á dagstovna- forskúla- skúla- og almannaøkinum. Harumframt er útbúgving til hjálparfólk partur av semjuni frá 14. januar 2018 millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag, har semja var um at heita á landsstýriskvinnuna í mentamálum um at skipa eina útbúgving til hjálparfólk. Við hesi útbúgving fáa ófaklærd hjálparfólk og onnur møguleika at førleikamenna seg og taka eina útbúgving innan námsfrøðiliga fakøkið.
Landsstýriskvinnan í mentamálum setti í mai 2018 arbeiðsbólk at gera tilmæli um útbúgvingina til pedagoghjálpara. Í arbeiðsbólkinum sita umboð fyri Mentamálaráðið, Kommunufelagið og Heilsuskúla Føroya.

### 1.2.1.2 Galdandi lóggáva
Galdandi lóggáva fevnir um útbúgvingarnar til heilsuhjálpara og heilsurøktara,sum fara fram á Heilsuskúla Føroya í Miðnámsdeplinum í Suðuroy.

### 1.2.1.3 Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at víðka ásetingarnar í galdandi lóg um heilsuhjálpara og heilsurøktara í einari nýggjari lóg, sum eisini skal fevna um útbúgvingina til pedagoghjálpara. Harumframt verður skotið upp, at ásetingar um skilhaldsreglur og onnur viðurskifti í hesum sambandi verða ásett í lógini, av tí at eingin slík áseting er í galdandi lóg.

### 1.2.1.4 Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Lógaruppskotið umfatar nú tríggjar útbúgvingar, nevniliga útbúgving til heilsuhjálpara, heilsurøktara og pedagoghjálpara.

Innihaldið í útbúgvingunum til heilsuhjálpara og heilsurøktara er óbroytt. Nýggja útbúgvingin til pedagoghjálpara verður ásett í nýggju lógini.

At pedagoghjálparaútbúgvingin verður skipað í Heilsuskúla Føroya hevur fleiri fyrimunir. Útbúgvingin til pedagoghjálpara er ein yrkisútbúgving eins og heilsurøktaraútbúgvingin. Fleiri av lærarunum í skúlanum hava neyðugan førleika at undirvísa í almennu lærugreinunum, sum eisini verða partar av útbúgvingini til pedagoghjálpara. Harumframt eru heilsuútbúgvingar og pedagoghjálparaútbúgvingin bygnaðarliga rættuliga eins skipaðar.

Í lógaruppskotinum eru eisini ásetingingar um skilhaldsreglur og onnur viðurskifti í hesum sambandi. Hetta eru reglur, sum eru ásettar fyri gymnasialar miðnámsútbúgvingar.

### 1.2.1.5. Ummæli og ummælisskjal
Lógaruppskotið fer til hoyringar hjá:
Føroya Pedagogfelag
Felagið fyri hjálparfólk
Føroya Lærarafelag ( skúlaleiðarafelagið)
Heilsurøktarafelagið
Heilsuhjálparafelag Føroya
Kommunufelagið

Almannaverkið
Almannamálaráðið,
Heilsuskúla Føroya
Fróðskaparsetur Føroya
Studna

**1.2.1.6. Samandráttur av ummælum**

**1.2.1.7 Samanumtikið um hoyringarsvarini**

**1.2.2. Kapittul . 2 Avleiðingar av uppskotinum**

**1.2.2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri landskassan**

Lógaruppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri landskassan. Mett verður, at neyðugt er við eini játtan uppá kr. 1,5. mill í 2019 til rakstur av útbúgvingini fyrsta árið. Av tí at talan er um vinnuførleikagevandi útbúgving hava næmingarnir rætt til lestrarstuðul frá Studna. Útreiðslurnar til lestrarstuðulin í hesum sambandi er mettur til kr. 650.000 í 12 mánaðir.
Harumframt má roknast við útreiðslum til samsýning til praktikkvegleiðing í sambandi við starvslæruna hjá næmingunum á pedagoghjálparaútbúgvingini. Upplýst verður, at eingin avtala er millum sáttmálapartarnar um hesi viðurskifti.
Kommunurnar hava ongar útreiðslur, orsakað av lógaruppskotinum.

**1.2.2.2 Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**

Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.
Lógaruppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri Heilsuskúla Føroya og fyri Studna í sambandi við lestrarstuðul til næmingar á pedagoghjálparaútbúgvingini.

**1.2.2.3 Avleiðingar fyri vinnuna**
Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

**1.2.2.4 fyri umhvørvið**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

**1.2.2.5 Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Hevur ongar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**1.2.2.6 Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**1.2.2.7 Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Eingir tvørgangandi millumtjóðasáttmálar eru á økinum**.**

**1.2.2.8 Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Eingir tvørgangandi millumtjóðasáttmálar eru á økinum

**1.2.2.9 Marknaforðingar**
Mett verður ikki, at uppskotið elvir til marknaforðingar.

**1.2.2.10 Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella ger onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

**1.2.2.11 Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

**1.2.2.12 Gjøld**
Lógaruppskotið hevur onga áseting um gjøld.

**1.2.2.13 Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?**
Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á fólk.

**1.2.2.14 Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur**
Lógaruppskotið leggur heimildir til landsstýrismannin m.a. at seta leiðara til skúlan og at gera nærri reglur við heimild í lógini. Landsstýrismaðurin í heilsumálum og almannamálum og kommunumálum skulu hava uppskot til kunngerð til ummælis.

**1.2.2.15 Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**1.2.2.16 Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ongar aðrar avleiðingar enn tær nevndu.

| | **Fyri landið/lands-myndugleikar** | **Fyri kommunalar myndugleikar** | **Fyri pláss/øki í landinum** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|---|
| **Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar** | ja | nei | nei | nei | nei |
| **Umsitingarligar avleiðingar** | ja | nei | nei | nei | nei |
| **Umhvørvisligar avleiðingar** | nei | nei | nei | nei | nei |
| **Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur** | nei | nei | nei | nei | nei |

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☎ +298 30 65 00 • ✉ mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | nei | nei | nei | nei | nei |

**Kap 3. Serligar viðmerkingar**

**Til § 1**

*Stk, 1.* Í mun til galdandi lóg verður landsstýrismanninum heimilað eisini at skipa fyri útbúgving til pedagoghjálpara. Endamálið við útbúgvingunum til heilsuhjálpara og heilsurøktara er tað sama sum í galdandi lóg. Innihald og karmar fyri allar tríggjar útbúgvingarnar verða ásettar av landsstýrismanninum við støði í fakligari ráðgeving, ið m.a. Útbúgvingarráðini (sí viðmerkingar til § 25) veita.

*Stk 2.* Í hesi grein eru tilskilað 4 yvirskipað endamál fyri útbúgvingina til heilsuhjálpara og heilsurøktara. Tey yrkisfakligu innan heilsu, røkt og umsorgan, tey almennu, tey samfelagsligu og tey persónligu.

*Stk. 3.* Í hesari grein eru somuleiðis ásett 4 yvirskipað endamál fyri útbúgvingina til pedagoghjálpara.

Tey yrkisfakligu innan námsfrøði og umsorgan á dagstovnaøkinum, frítíðar- og skúlaøkinum og búð- og umlættingarstovnum innan almannaøkið, tey almennu, tey samfelagsligu og tey persónligu.

**Til § 2**

Tilskilað er, at útbúgvingarnar fara fram í Heilsuskúla Føroya. Henda áseting er í galdandi lóg.

**Til § 3**

*Stk. 1.* Ásetingin er hin sama sum í galdandi lóg. Tó er ásetingin um fólkaskúlaútbúgving broytt til 9. floks próvtøku fólkaskúlans. Treytirnar fyri upptøku til heilsuhjálparaútbúgvingina eru, at umsøkjarin hevur arbeitt ella verið undir onkrari útbúgving í minsta lagi 1 ár eftir at umsøkjari hevur lokið 9. floks próvtøku fólkaskúlans. Hetta merkir, at tað ber ikki til at fara beinleiðis úr fólkaskúlanum á heilsuhjálparaútbúgving. Sum heilsuhjálpari kemur viðkomandi at hava ábyrgd av fólki, ið t.d.eru óhjálpin, og tí krevst, at viðkomandi, sum fer í heilsuhjálparaútbúgving, er búgvin. Upptøkukrøvini eru tey somu sum í galdandi lóg.

*Stk. 2.* Ásetingin er tann sama sum í galdandi lóg. Sambært hesi grein skal Heilsuskúli Føroya gera eina meting av, um umsøkjarin er førur fyri, á nøktandi hátt, at lúka krøvini í útbúgvingini. Metingin skal vera ítøkilig.

**Til § 4**

*Stk. 1.* Ásetingin er tann sama sum í galdandi lóg. Treytirnar fyri upptøku til heilsurøktaraútbúgvingina eru, at umsøkjarin hevur lokið heilsuhjálparaútbúgving ella hevur viðkomandi útbúgving og ella arbeiðsroyndir, sum til longdar eru á støði við heilsuhjálparaútbúgvingina, t.e. 15 mánaðir.
*Stk. 2.* Ásetingin er tann sama sum í galdandi lóg. Sambært hesi grein skal Heilsuskúli Føroya gera eina meting av, um umsøkjarin er førur fyri, á nøktandi hátt, at lúka krøvini í útbúgvingini. Metingin skal vera ítøkilig.

**Til § 5**

Ásetingin, sum er nýggj í mun galdandi lóg, snýr seg um treytirnar fyri upptøku til útbúgvingina til pedagoghjálpara. Treytirnar fyri upptøku eru, at umsøkjari hevur 2 ára útbúgvingar og ella arbeiðsroyndir aftaná lokið 9. floks próvtøku fólkaskúlans. Sum pedagoghjálpari kemur viðkomandi at arbeiða innan praktisk námsfrøðiligt virksemi við børnum, ungum og vaksnum, og tí er 2 ára útbúgvingar og ella arbeiðsroyndir settar sum eitt av upptøkukrøvunum.

**Til § 6**

Áseting er um avriksfluting, sum er galdandi fyri allar tríggjar útbúgvingarnar. Leiðari skúlans kann, við støði í ítøkiligari meting av førleikanum hjá tí einstaka umsøkjaranum, fremja avriksflutning í almennum lærugreinum frá øðrum útbúgvingum, um hesar kunnu javnsetast, og ella góðskriva viðkomandi arbeiðsroyndir, um hesar kunnu javnsetast við málini fyri starvsvenjingina. Landsstýrismanninum verður heimilað at áseta nærri reglur um avriksflutning til partar av heilsuútbúgvingunum og pedagoghjálparaútbúgvingini. Hetta merkir, at eisini útbúgvingarnar koma inn í yvirlitið yvir møguleikarnar fyri avriksflutningi í almennum lærugreinum millum miðnámsútbúgvingar.

**Til § 7**

*Stk. 1.* Ásetingin er tann sama sum í galdandi lóg, tó soleiðis, at hon eisini er galdandi fyri útbúgvingina til pedagoghjálpara. Ásetingin tilskilar, at útbúgvingarnar fevna um ein ástøðiligan part og ein starvsligan part. Ásetingin er galdandi fyri allar tríggjar útbúgvingarnar.

*Stk. 2.* Ásetingin er tann sama sum í galdandi lóg, tó soleiðis, at hon eisini er galdandi fyri útbúgvingina til pedagoghjálpara. Her verður tilskilað, at ástøðiligu og starvsligu partarnir í útbúgvingunum skulu hanga saman og stuðla uppundir hvønn annan, so læringsúrstøkan verður betri og samanhangandi.

**Til § 8**

*Stk. 1.*
Ásetingin er tann sama sum í galdandi lóg. Í greinini er tilskilað, at útbúgvingin til heilsuhjálpara tekur 15 mánaðir, harav í minsta lagi 28 vikur er undirvísing í skúla. Ásetingin fevnir tó ikki um útbúgvingina til pedagoghjálpara, tí reglur um hesa útbúgving eru í § 10 í lógini. Í hesum sambandi verður víst til viðmerkingarnar til § 10 í lógini.

*Stk. 2.* Ásetingin er tann sama sum í galdandi lóg. Henda áseting er um førleikarnar, sum næmingur eftir lokna útbúgving sum heilsuhjálpari, skal hava ognað sær.

**Til § 9**

*Stk. 1.* Ásetingin er tann sama sum í galdandi lóg. Í greinini er tilskilað, at útbúgvingin til heilsurøktara tekur 22 mánaðir og tilskilað er, at í minsta lagi 40 vikur fevna um undirvísing í skúla. Ásetingin fevnir tó ikki um útbúgvingina til pedagoghjálpara, tí reglur um hesa útbúgving eru í § 10 í lógini. Í hesum sambandi verður víst til viðmerkingarnar til § 10 í lógini.

*Stk. 2.* Ásetingin er tann sama sum í galdandi lóg. Henda áseting er um førleikarnar, sum nemingur eftir lokna útbúgving sum heilsurøktari, skal hava ognað sær.

**Til § 10**

*Stk. 1.* Henda ásetingin er nýggj í mun til galdandi lóg. Í greinini eru ásetingar um útbúgvingina til pedagoghjálpara, sum tekur 24 mánaðir, íroknað frítíð. Ástøðiligi parturin skal í minsta lagi fevna um 44 vikur íroknað próvtøku. Starvsvenjingin verður skipað soleiðis, at eitt starvsvenjingarskeið verður á dagstovnum, forskúlum ella frítíðartilboðum, og eitt starvsvenjingarskeið á serøkinum, t.d. á samdøgurstovnum og øðrum serstovnum.

*Stk. 2.* Henda áseting er nýggj í mun til galdandi lóg, og snýr seg um grundleggjandi námsfrøðiligar førleikar, sum nemingurin eftir loknað útbúgving sum pedagoghjálpari skal hava ognað sær.

**Til § 11**

*Stk. 1.* Henda áseting er tann sama sum í galdandi lóg, og fevnir eisini um útbúgvingina til pedagoghjálpara. Landsstýrismanninum verður heimilað í kunngerð at áseta nærri reglur um útbúgvingarnar, innihald vav, próvtøkur, prógv umframt kærur í sambandi próvtøku.

*Stk. 2.* Tá talan er um at áseta reglur sambært § 11, stk. 1, skulu hesar senda landsstýrismonnunum í almannamálum, heilsumálum og kommunumálum til ummælis. Hetta verður gjørt fyri at tryggja fakliga støðið í útbúgvingunum.

**Til § 12**

*Stk. 1.* Henda áseting er tann sama sum í galdandi lóg, til eisini at fevna um útbúgvingina til pedagoghjálpara. Ein námsskipan er ítøkilig lýsing av innihaldinum í ástøðiligu og starvsligu pørtunum av einari útbúgving. Námsskipan er gjørd fyri hvørja útbúgving sær. Heilsuskúli Føroya skal neyvt lýsa, hvussu útbúgvingin verður løgd til rættis, og hvussu øll viðurskifti í útbúgvingini verða framd.

*Stk. 2.* Henda ásetingin er tann sama sum í galdandi lóg, og fevnir eisini um útbúgvingina til pedagoghjálpara. Heilsuskúli Føroya og starvsvenjingarstøðini skulu samstarva fyri at røkka málunum um starvslæruna, sum verða ásett í námsskipanini.

*Stk. 3.* Henda áseting er tann sama sum í galdandi lóg, og fevnir eisini um útbúgvingina til pedagoghjálpara. Mentamálaráðið skal góðkenna námsskipanirnar áðrenn námsskipanirnar fáa gildi. Men áðrenn námsskipanirnar verða sendar Mentamálaráðnum til endaliga góðkenningar,

skulu hesar, hvør í sínum lagi, ummælast í Útbúgvingarráðunum (sí § 22, stk. 2), so fakliga góðskan í útbúgvingunum verður tryggjað. Ástøðiligi og starvsligi parturin av útbúgvingunum skulu hanga saman.

**Til § 13**

Henda áseting er tann sama sum í galdandi lóg, og fevnir eisini um útbúgvingina til pedagoghjálpara. Heilsuskúli Føroya skal góðkenna starvsvenjingarstøðini. Hetta er eisini galdandi fyri starvsvenjingina hjá næmingum á pedagoghjálparaútbúgvingin. Ásetingin er gjørd fyri at tryggja góðskuna í starvsliga partinum.

**Til § 14**

Henda áseting er tann sama sum í galdandi lóg, og fevnir eisini um útbúgvingina til pedagoghjálpara. Ásett verður, at skúlin skal tryggja næmingarnar í samlaðu útbúgvingartíðini, t.e. í skúlapartinum og í starvsvenjingarpartinum. Av tí at skúlin hevur ábyrgd av næminginum alt útbúgvingarskeiðið, fevnir tryggingin um samlaðu útbúgvingargongdina hjá næminginum. Í heilsuútbúgvingunum er vandi serliga fyri, at skaði kann standast av at lyfta.

**Til § 15**

*Stk 1.* Hetta er sama áseting sum í galdandi lóg.

*Stk. 2.* Henda áseting er tann sama sum í galdandi lóg, og fevnir eisini um førleikakrøv til teirra, ið undirvísa næmingum, sum ganga á pedagoghjálparaútbúgvingini. Landsstýrismaðurin ásetur førleikakrøv til leiðara og lærarar á øllum útbúgvingunum í Heilsuskúla Føroya. Krøvini eru ásett í kunngerð nr. 8 frá 19. januar 2017 um námsfrøðiliga útbúgving av lærarum á vinnuskúlum og miðnámskúlum.

*Stk. 3.* Henda áseting er tann sama sum í galdandi lóg. Heilsuskúli Føroya er nú vorðin partur av Skúladeplinum í Suðuroy.

**Til § 16**

*Stk. 1.* Henda áseting er tann sama sum í galdandi lóg. Tilskilað verður, at leiðarin hevur evstu ábyrgd av skúlans virksemi mótvegis landsstýrismanninum.

*Stk. 2.* Henda áseting er nýggj í mun til galdandi lóg. Leiðarin í Heilsuskúlanum tekur allar ítøkiligar avgerðir viðvíkjandi næmingunum. Talan er um allar fyrisitingarligar avgerðir, sum hava persónligar avleiðingar. Upptøka er sera týðandi avgerð, tá tað snýr seg um framtíðina hjá einum ungum fólki, og tí er tað serliga tilskilað í lógini. Sum ítøkiligar avgerðir, sum leiðarin kann taka, eru t.d. ávaring, burturvísing og onnur agatiltøk, sum eru at rokna sum fyrisitingarligar avgerðir.

*Stk. 3.* Sama áseting sum í galdandi lóg. Ásett er, at tað er leiðarin í Heilsuskúlanum, sum hevur ábyrgd av prógvtøkuni, og sum skrivar út prógv.

*Stk. 4.* Hetta er sama áseting sum í galdandi lóg. Tað er leiðarin í Heilsuskúlanum, sum er setanarmyndugleiki. Leiðarin setur og loysir úr starvi lærarar og onnur starvsfólk og hevur ábyrgdina av øllum starvsfólkaviðurskiftum.

**Til § 17**
Sama áseting sum í galdandi lóg. Ásett verður, at Heilsuskúlin skal lata Mentamálaráðnum allar kravdar upplýsingar í talgildum formi, eitt nú hagtøl, so Mentamálaráðið veit um undirvísingargongdirnar í skúlanum, eisini tá talan er um próvtøku.

**Til § 18**
Sama áseting sum í galdandi lóg. Við undirvísingarbyrjan skal skúlin saman við næminginum gera ein persónliga útbúgvingarætlan fyri útbúgvingargongdina í sínari heild og fyri einstøku útbúgvingarpartarnar. Hetta kravið er við til tess at sjónliggera endamálini í útbúgvingini, samstundis sum útbúgvingarætlanin er við til at stuðla upp undir persónligu menningini og læringartilgongdini hjá øllum næmingum, ið er grundarlagið fyri fakligu menningini og úrtøkuni.

**Til § 19**
Sama áseting sum í galdandi lóg. Tilskilað verður, at skúlin fær heimild at veita næmingum, ið hava trupult við at fylgja við í vanligu undirvísingini, eyka undirvísing.

**Til § 20**
Sama áseting sum í galdandi lóg. Skúlin kann veita sernámsfrøðiligan stuðul til næmingar, ið hava skerdan virkisførleika. Nærri reglur um sernámsfrøðiliga stuðulin verða ásettar av landsstýrismanninum.

**Til § 21**
Sama áseting sum í galdandi lóg. Tað er umráðandi, at næmingar undir útbúgving fáa lestrarvegleiðing, sum kann stuðla uppundir, at næmingarnir tilogna sær gott fimi og arbeiðslag og fáa góða úrtøku í læritilgongdini. Harumframt skal lestravegleiðing fyribyrgja fráfalli og vegleiða næmingunum um yrkisleið. Landsstýrismaðurin ger nærri reglur um lestrarvegleiðing.

**Til § 22**
*Stk. 1.* Nýggj áseting. Næmingur hevur umframt møtiskyldu eisini skyldu at taka virknan lut í undirvísingini. Hetta er ein fortreyt fyri góðum úrsliti í læringartilgongdini.

*Stk 2.* Landsstýrismanninum verður veitt heimild til at seta í verk yvirskipaðar reglur fyri møtiskyldu og reglur fyri skylduna at vera virkin í undirvísingini.

*Stk. 3.* Nýggj áseting. Landsstýrismaðurin ger yvirskipaðar reglur um agatiltøk fyri brot á reglurnar í stk. 2. Áseting um hetta kemur í lógina, tí mett verður, at tørvur er á at hava yvirskipaðar reglur um agatiltøk, sum Heilsuskúlin eins og miðnámsskúlar kunnu fyrisita eftir.

*Stk. 4.* Nýggj áseting. Leiðarin í Heilsuskúla Føroya hevur sambært hesi áseting skyldu til at upplýsa næmingarnar um reglurnar í stk. 2 og 3.

**Til § 23**

*Stk. 1.* Leiðarin í Heilsuskúla Føroya hevur sum ovasti dagligi myndugleiki á stovninum, ábyrgd av, at skilhaldsreglur verða gjørdar fyri virksemið í skúlanum.

*Stk. 2.* Nýggj áseting, sum tilskilar, at næmingur hevur skyldu at halda skilhaldsreglur skúlans.

*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin skal góðkenna skilhaldsreglurnar, sum leiðarin í Heilsuskúlanum ger. Somuleiðis skal leiðarin gera reglur um agatiltøk fyri brot á skilhaldsreglurnar.

*Stk. 4.* Leiðarin í Heilsuskúla Føroya hevur skyldu at kunna næmingin um tær skilhaldsreglur, ið eru galdandi í skúlanum, og um avleiðingarnar, um skilhaldsreglurnar ikki verða hildnar.

**Til § 24**

*Stk. 1.* Henda áseting er nýggj og snýr seg um innanhýsis eftirmetingar. Eftirmetingarnar fevna bæði um munnlig og skrivlig avrik hjá næmingunum. Innanhýsis eftirmetingarnar skulu vera regluligar og ítøkiligar og geva eina greiða mynd av læruúrtøku næmingsins.

*Stk. 2.* Greinin tilskilar, at leiðarin í minsta lagi eina ferð hvørja skúlahálvu skal saman við viðkomandi lærarum eftirmeta úrslitini í einstøku flokkunum og ella bólkunum hjá einstaka næminginum. Hetta verður ásett, tí leiðari hevur ábyrgdina av øllum viðurskiftum næminganna - eisini at fylgja við úrtøkuni hjá einstaka næminginum.

*Stk. 3.* Leiðari skúlans skal gera reglur fyri, hvussu innanhýsis eftirmetingar verða skipaðar og framdar. Yvirskipaðar reglur um, hvat skal eftirmetast í teimum einstøku lærugreinunum eru nærri ásettar í námsætlanunum.

**Til § 25**

*Stk. 1.* Sama áseting sum galdandi lóg. Ásetingin snýr seg um, at næmingarnar í skúlanum skulu sjálvir útvega sær bøkur og annað undirvísingartilfar. Nevnast kann, at sama skipan er galdandi á gymnasialu miðnámsútbúgvingunum.

*Stk. 2.* Sama áseting sum í galdandi lóg. Skúlin fær heilmild at krevja gjald fyri ljóstøk og útprenting. At ljósprenting og útprenting er serliga nevnt, er orsakað av øktu nýtsluni av internetinum í útbúgvingunum. Krevjast kann bert gjald fyri veruligu útreiðslurnar, sum standast av hesum.

**Til § 26**

*Stk. 1.* Nýggj áseting. Útbúgvingarráðið fyri heilsuútbúgvingarnar hevur 7 limir, tilnevndir av landsstýrismanninum. Útbúgvingarráðið er eitt sera týðandi amboð, tá ið tað snýr seg um at dagføra útbúgvingarnar og tillaga tær. Ráðið skal støðugt virka fyri at geva útbúgvingunum íblástur og mæla til møguligar dagføringar, so útbúgvingarnar eru førar fyri at taka upp nýggj faklig og námsfrøðilig fyribrigdi, ið kunnu menna undirvísingina. Útbúgvingarráðið skal tryggja, at heilsuútbúgvingarnar hava eitt fakligt støði, sum nøktar tørvin innan almanna- og heilsuverkið, og at tær kunnu samanberast við samsvarandi útbúgvingar uttan fyri Føroyar.

*Stk. 2.* Snýr seg um tilnevning av  tiltakslimum, og skulu hesir verða tilnevndir umboðandi somu stovnar, feløg og lærarar, sum í stk. 1.

*Stk. 3.* Limirnir í Útbúgvingarráðnum skulu hava eitt fakligt innlit í heilsu- og umsorgnarøkið. Útbúgvingarráðið fyri heilsuútbúgvingarnar skal veita ein heildargrundaðan fakligan íblástur til útbúgvingarnar og vera ein virkin sparringspartnari í hesum sambandi.

*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin tilnevnir formannin millum limirnar í útbúgvingarráðnum.

**Til § 27**

*Stk. 1.* Nýggj áseting. Útbúgvingarráðið fyri pedagoghjálparaútbúgvingina hevur 6 limir, tilnevndir av landsstýrismanninum. Útbúgvingarráðið er eitt sera týðandi amboð, tá ið tað snýr seg um at seta seta nýggju útbúgvingina í verk, dagføra og tillaga hana. Ráðið skal støðugt virka fyri at geva útbúgvingini íblástur og gera uppskot til viðkomandi dagføringar, sum kunnu menna útbúgvingina. Útbúgvingarráðið skal tryggja, at útbúgvingin til pedagoghjálpara hevur eitt fakligt støði, sum nøktar tørvin innan námsfrøðiliga virksemi á dagstovna- almanna- og skúlaøkinum, og at útbúgvingin kann samanberast við samsvarandi útbúgvingar uttan fyri Føroyar.

*Stk. 2.* Greinin snýr seg um tilnevning av tiltakslimum, og skulu hesir verða tilnevndir umboðandi somu stovnar,feløg og lærarar, sum í stk. 1.

*Stk. 3.* Limirnir í Útbúgvingarráðnum skulu hava eitt fakligt innlit í námsfrøðiligt virksemi innan dagstovnaøkið, stovnar á almannaøkinum og skúlaøkinum. Útbúgvingarráðið fyri pedagoghjálparaútbúgvingina skal kunna geva eina heildargrundaðan fakligan íblástur til útbúgvingina og vera ein virkin sparringspartnari í hesum sambandi.

*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin tilnevnir formannin millum tilnevndu limirnar í Útbúgvingarráðnum fyri pedagoghjálparaútbúgvingina.

**Til § 28**

*Stk. 1.* Greinin snýr seg um, at Útbúgvingarráðini, hvør í sínum lagi, javnan eftirmeta tørv á dagføringum og broytingum innan heilsuútbúgvingar og pedagoghjálparaútbúgvingina. Tað hevur stóran týdning, at allar tríggjar útbúgvingarnar eru á hædd við líknandi útbúgvingar í okkara grannalondum. Hetta soleiðis, at okkara næmingar hava møguleikan at taka ein part av útbúgvingini, t.d. starvsvenjingarpartin í einum øðrum Norðurlandi. Men eisini fyri, at útbúgvingarnar eru á støði við líknandi útbúgvingar í øðrum londum.
Harumframt skulu persónar, sum hava lokið prógv sum heilsuhjálpari, heilsurøktari og pedagoghjálpari, hava møguleikan at arbeiða í øðrum Norðurlondum.

*Stk. 2.* Sama áseting sum í galdandi lóg. Tilskilað verður, at Útbúgvingarráðini, hvør í sínum lagi, skulu hava námsskipaninar til ummælis, áðrenn tær verða sendar landsstýrismanninum til góðkenningar. Í námsskipanunum verður innihaldið av ástøðiliga og starvsliga partinum í útbúgvingunum ásettur.
*Stk. 3.* Sama áseting sum í galdandi lóg. Mett verður, at tað hevur týdning, at Útbúgvingarráðini, av sínum eintingum kunnu taka øll mál upp, sum hava við útbúgvingarnar at gera. Hetta fyri at

tryggja møguleikan fyri, at limirnir við teirra innliti og vitan innan avvarðandi starvsøki, kunnu geva íblástur og uppskot til viðkomandi dagføringar av útbúgvingunum.

*Stk. 4.* Sama áseting sum í galdandi lóg, og er endamálið, at Útbúgvingarráðini fáa heimild at útvega sær vitan frá serkønum í málum og viðurskiftum, har limirnir í Útbúgvingarráðunum ikki hava neyðugu vitanina og ella innlit í.

**Til § 29**

*Stk. 1.* Nýggj áseting. Kærufreistin í sambandi við próvtøku og onnur námsfrøðilig viðurskifti er í uppskotinum ásett til 7 dagar í mun til 14 dagar í galdandi lóg. Kærufreistin er ásett til 7 dagar, so kærufreistin í heilsuútbúgvingunum og í pedagoghjálparaútbúgvingini er tann sama sum í øðrum útbúgvingum, eitt nú  gymnasialu miðnámsútbúgvingunum. At kærufreistin er sett til 7 dagar hevur millum annað støði í, at tað í sambandi við próvtøku er umráðandi, at eitt nú próvtøkugongd og ásetan av próvtali ikki er farið úr minninum hjá teimum (próvhoyrara og próvdómara), sum skulu grundgeva fyri, hví eitt ávíst próvtal er ásett. Tess skjótari eitt kærumál verður reist, tess betur eru líkindini fyri, at kærumálið verður viðgjørt rætt.

*Stk. 2.* Sama áseting sum í galdandi lóg. Í kunngerð um heilsuútbúgvingar og kunngerð um pedagoghjálparaútbúgvingina skal kærugongdin lýsast, og verður hon tann sama, sum í øðrum útbúgvingum, eitt nú gymnasialu miðnámsútbúgvingunum.

*Stk. 3.* Nýggj áseting. Greinin snýr seg um, at aðrar fyrisitingarligar avgerðir enn tær í stk. 1, kunnu kærast til landsstýrismannin. Freistin til slíkar kærur eru 14 vikur.

**Til § 30**
*Stk. 1.* Skotið verður upp, at lógin kemur í gildi 1. januar 2019. Ásetingin um skiftisreglur skulu tryggja, at næmingar, ið eru farnir undir útbúgving sum heilsuhjálpari og heilsurøktari undir galdandi skipan, fylgja teimum reglum, ið vóru galdandi, áðrenn farið var undir útbúgvingina.

*Stk. 2.* Skotið verður upp, at galdandi kunngerð um námsfrøðiliga útbúgving av lærarum á vinnu- og miðnámsskúlunum verður galdandi fyri leiðara og lærarar í Heilsuskúla Føroya. At lærarar í Heilsuskúla Føroya hava námsfrøðiliga útbúgving, er partur av samlaða førleikanum hjá lærarunum, og er hesin førleikin partur av góðkenningini av føroysku heilsuútbúgvingunum og pedagoghjálparaútbúgvingini t.d. í Danmark. Talan er um kunngerð nr. 8 frá 19. januar 2017 um námsfrøðiliga útbúgving av lærarum á vinnuskúlum og miðnámskúlum.

Mentamálaráðið, xx. september 2018

**Rigmor Dam**
landsstýrismaður

/Poul Gert Hansen